VØRN

FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 15
Postboks 347
110 Tórshavn

*Tórshavn, tann 2. juni 2017*
*Mál: 17/00227-1*
*(at tilskila í svari)*

*Viðgjørt: EH*

*Tygara skriv:*

YVIRI VIÐ STROND 3
P.O.BOX 1238
FO-110 TÓRSHAVN
FAROE ISLANDS

PHONE +298 311065
FAX +298 313981
VORN@VORN.FO
WWW.VORN.FO

# Frágreiðing um flytingar av veiðiloyvum í bólki 3

Fiskimálaráðið hevur biðið um eina frágreiðing um, hvussu flytingar av veiðuloyvum hjá línuskipum í bólki 3 á uppsjóvarskip fara fram.

Vørn skal í fyrstu atløgu viðmerkja, at málið vendur eitt sindur øvugt, tí upprunaliga hevur tað verið Vørn, sum hevur sett spurnartekin við heimildina at frítaka bólk 3 frá støddarkravinum í kunngerðini um veiðiorku. Vørn noktaði t.d. at flyta veiðiloyvið frá Barinum á Ran, men Fiskimálaráðið setti avgerðini til viks. Sama søga tók seg upp, tá Urwaag kom inn og gjørdist Klakkur.

Tað var tískil við áhuga, at Vørn las niðurstøðuna hjá Løgtingsins Umboðsmanni í desember 2014, ið rættuliga nágreiniliga viðgjørdi hesi viðurskifti. Løgtingsins Umboðsmaður sigur m.a. í niðurstøðuni:

*"Eg meti tí, at tað er sera ivasamt, um landsstýrismaðurin hevur heimild til at undantaka línuskipini frá metingini av fiskiorku sambært grein 9 í kunngerðini um áseting av fiskiorku og mannagongdum".*

Í januar 2015, stutt aftaná, at álitið frá Løgtingsins Umboðsmanni var lagt fram, fekk Vørn eina umsókn um flyting av veiðiloyvi frá m/s Thomas Nygaard á m/s Havbúgvan. Umsóknin varð svarað noktandi við tilvísing til kravið um fiskiorku og í samsvar við niðurstøðuna hjá Løgtingsins Umboðsmanni. Sí brot frá svarskrivi niðanfyri:

*"Talan er um veiðiloyvi í bólki 3, sum eru undantikin støddarkravinum í § 8, stk. 1, í lóg um vinnuligan fiskiskap, smbr. § 9, í kunngerð nr. 75 frá 13. juni 2006 um áseting av fiskiorku og mannagongd, tá ið veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør.*

*Sambært áliti viðvíkjandi klagu um sýtan av loyvi at fiska makrel frá Løgtingsins Umboðsmanni frá 10. desembur 2014 verður sagt á síðu 32, at "(h)eimildin hjá landsstýrismanninum sambært § 8, stk. 7 fevnir eftir mínum tykki einans um, at landsstýrismaðurin við kunngerð kann áseta reglur um, hvussu fiskiorka verður roknað út, og um mannagongd fyri samanlegging og umsiting av § 8, stk. 1 – 5. Eg meti tí, at tað er sera ivasamt, um landsstýrismaðurin hevur heimild til at undantaka línuskipini frá metingini av fiskiorku sambært § 9 í kunngerðini um áseting av fiskiorku og mannagongdum.*

*Vørn kunnugt, hevur Fiskimálaráðið tikið átalurnar frá Løgtingsins Umboðsmanni til eftirtektar, og skal Vørn tískil boða frá, at so leingi ongar reglur í kunngerð smbr. § 8, stk. 7, í lóg um*

VØRN

FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

*vinnuligan fiskiskap áseta reglur um útrokning av veiðiorku fyri fiskifør í bólki 3, er útgangsstøðið støddarkravið smbr. § 8, stk. 1, í lóg um vinnuligan fiskiskap.*

*Boðast skal tískil frá, at ein umsókn um at flyta veiðiloyvi frá einum fari í bólki 3 til eitt størri far, roknað sum longd x breidd x dýpd, ikki verður gingin á møti."*

Henda avgerð var tann 30. januar 2015 kærd til Fiskimálaráðið. Tann 5. mars 2015 tekur Fiskimálaráðið avgerð um at seta avgerðina hjá Vørn til viks. Fiskimálaráðið skrivar m.a. í avgerðini:

*"Samstundis verður sagt frá, at Fiskimálaráðið er farið undir at kanna, um, og í játtandi føri hvussu, nevnda kunngerð og regluverk kann broytast fyri at ganga niðurstøðuni hjá Løgtingsins Umboðsmanni í nevnda áliti á møti. Fiskimálaráðið er tó av teirri fatan, at tað hvørki er rætt ella rímiligt at broyta fyrisitingarliga venju mótvegis borgararanum, fyrr enn regluverkið er broytt og tí verður avgerðin hjá Vørn sett til viks og henda sett í staðin."*

Vørn skal vísa á, at regluverkið ikki er broytt, og Vørn hevur ikki fingið onnur boð frá Fiskimálaráðnum enn omanfyri nevnda skriv.

Vørn skal eisini vísa á, at frá 2013 var makrelkunngerðin broytt til, at makrelur útlutaður til línuskip skuldi fiskast við húki. Við hesari treyt steðgaðu allar flytingar av veiðiloyvum frá línuskipum til uppsjóvarskip. Tá 70.000 tons av svartkjafti sambært kunngerð vórðu tillutað øllum at fiska sum felagskvota – eisini bólki 3 – uttan nakra avmarking viðvíkjandi reiðskapi, og tá í eingin broyting er framd viðvíkjandi kunngerðini um veiðiorku, so hevur Vørn ikki havt nakra heimild at nokta veiðiloyvum í bólki 3 at verða flutt á Slættaberg og Næraberg, av tí at hesar kunngerðir eru direktivir, sum eru bindandi fyri Vørn. Vørn kundi ikki noktað hesum flytingum við at uppstilla onnur kriteriir, enn tey sum vórðu sett av landsstýrismanninum. Tá avmarkingin viðvíkjandi reiðskapi ikki varð sett í svartkjaftakunngerðina eins og í makrelkunngerðina, og eingin regla er um stødd fyri bólk 3 eins og t.d. fyri bólk 4 og 5, sum eisini royna við línu, kann Vørn ikki gera annað enn at umsita tær reglur, sum eru latnar Vørn at umsita

Vørn skal eisini vísa á, at Fiskimálaráðið er væl vitandi um, at flytingar frá línuskipum á uppsjóvarskip fer fram. Á sumri 2016 var loyvt m/s Næraberg og m/s Slættaberg at royndarfiska eftir makreli í grønlendskum sjógvi. Í samband við tað málið setti Fiskimálaráðið treyt um, at m/s Slættaberg hevði veiðiloyvi. Vørn flutti í hesum sambandi veiðiloyvið á m/s Helenu á m/s Slættaberg og kunnaði Fiskimálaráðið um hetta.

Samstundis hevur Fiskimálaráðið, í samband við at umsiting og avgreiðsla av veiðiloyvum uttan fyri fiskidagaskipanina varð flutt til Vørn, tann 6. apríl 2017, viðheft útgreinað yvirlit yvir allar flytingar av hesum veiðiloyvum. Á hesum yvirliti, sum Fiskimálaráðið hevur sett saman, sæst at veiðiloyvi í bólki 3 eru flutt á uppsjóvarskip m.a. í 2016.

Vegna Vørn

Elmar Højgaard

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Jónfinn Thomsen, advokatur
Áarvegur 1
Boks 52
110 Tórshavn

Stjórnarskrivstovan
5. mars 2015
Mál: 15/00100-5
(at tilskila í svari)

Viðgjørt:

Tygara skriv: 2015005

**Kæruavgerð Fiskimálaráðsins í málinum um flytan av veiðiloyvi hjá m/s Thomas Nygaard, yvir á annað skip, m/s Havbúgvin.**

Fiskimálaráðið móttók 30. januar 2015 kæru tygara vegna P/F Hýsisá viðvíkjandi avgerðini hjá Vørn, Fiskiveiðieftirlitið, sum 28. januar 2015 tók avgerð um ikki at ganga tygara umsókn á møti um at flyta veiðiloyvið hjá m/s Thomas Nygaard, yvir á annað skip, m/s Havbúgvin.

Grundgevingin hjá Vørn, Fiskiveiðieftirlitinum, er, at "so leingi ongar reglur í kunngerð smbr. § 8, stk. 7, í lóg um vinnuligan fiskiskap áseta reglur um útrokning av veiðiorku fyri fiskifør í bólki 3, er útgangsstøðið støddarkravið smbr. § 8, stk. 1, í lóg um vinnuligan fiskiskap." Hetta undir tilvísing til brot úr niðurstøðu í áliti frá Løgtingsins Umboðsmanni frá 10. desember 2014, s. 32.

**Fiskimálaráðið hevur avgjørt at seta avgerðina hjá Vørn, Fiskiveiðieftirlitinum, til viks.**

Í sama viðfangi **avgerð** Fiskimálaráðið at ganga umsóknini um at flyta veiðiloyvið hjá m/s Thomas Nygaard yvir á annað skip, m/s Havbúgvin, á møti.

Grundgevingin hjá Fiskimálaráðnum er, at mett verður ikki, at týðandi munur er á fiskiorkuni hjá línuskipum, sum eru flokkað í bólki 3. Tí er lógásetta treytin um, at skipið, sum veiðiloyvið verður flutt á, ikki má hava størri fiskiorku, lokin, tá talan er um annað skip í bólki 3. Víst verður til § 8, stk. 1, 1. pkt. í lógini um vinnuligan fiskiskap og § 9, nr. 1 í kunngerð um áseting av fiskiorku og mannagongd, tá veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør 15 tons og størri.

Harafturat staðfestir Fiskimálaráðið, at síðani kunngerðin varð broytt í 2011, har ásett varð, at metingarvirðið fyri fiskiorku hjá skipum, ið royna við húki, ikki fevndi um skip í høvuðsbólki 3, sbrt. § 28 stk. 1 í lógini, eru umsóknir av hesum slagi higartil viðgjørdar samsvarandi omanfyri nevndu tulking. Broytingin av kunngerðini tók støði í eini meting av fiskiorkuni, sum varð gjørd fyri allan skipabólkin. Niðurstøðan var, at ongin týðandi munur er á fiskiorkuni hjá skipum, sum royna við húki í høvuðsbólki 3, óansæð skipastødd. Ein meting, sum táverandi fyrisitingarligi myndugleikin, Fiskimálaráðið, seinni legði til grund í viðgerðum av málum, har talan var um at flyta veiðiloyvi hjá fiskiførum í bólki 3 á onnur skip.

Síggjast kann tí heldur ikki burtur frá, at umsøkjarar hava grundaða vón um, at mál av sama slagi fáa somu viðgerð í fyrisitingini, óansæð hvør fyrisitingarligi myndugleikin er, í hvussu so er so leingi sum lóggávan stendur við óbroytt. Tí hevur Fiskimálaráðið avgjørt at seta avgerðina hjá Vørn, Fiskiveiðieftirlitið, til viks, og hevur sett hesa í staðin.

Samstundis verður sagt frá, at Fiskimálaráðið er farið undir at kanna, um, og í játtandi føri hvussu, nevnda kunngerð og regluverk kann broytast fyri at ganga niðurstøðuni hjá Løgtingsins

Umboðsmanni í nevnda áliti á møti. Fiskimálaráðið er tó av teirri fatan, at tað hvørki er rætt ella rímiligt at broyta fyrisitingarliga venju mótvegis borgaranum, fyrr enn regluverkið er broytt og tí verður avgerðin hjá Vørn sett til viks og henda sett í staðin.

Heitt verður á p/f Hýsisá um at fáa formligu viðurskiftini í sambandi við flytan av veiðiloyvinum av m/s Thomas Nygaard og yvir á m/s Havbúgvin avgreidd innan 1. apríl 2015.

Vegna Fiskimálaráðið,

Anni á Hædd

Anni á Hædd
deildarstjóri

VØRN

FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

SP/F Jónfinn Thomsen
Áarvegur 1
Postboks 52
110 Tórshavn, box

Tórshavn, tann 28. januar 2015
Mál: 13/00102-5
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: HP

Tygara skriv:

YVIRI VIÐ STROND 3
P.O.BOX 1238
FO-110 TÓRSHAVN
FAROE ISLANDS

PHONE +298 311065
FAX +298 313981
VORN@VORN.FO
WWW.VORN.FO

## Svar uppá fyrispurning/umsókn

Vørn hevur fingið fyrispurning/umsókn tann 27. januar 2015, hvar spurt verður um P/F Hýsisá kann gagnnýta tilsøgnina frá 7. mars 2013 til at flyta fyrrverandi veiðiloyvið hjá Thomas Nygaard yvir á m/b Havbúgvan.

Talan er um veiðiloyvi í bólki 3, sum eru undantikin støddarkravinum í § 8, stk. 1, í lóg um vinnuligan fiskiskap, smbr. § 9, í kunngerð nr. 75 frá 13. juni 2006 um áseting av fiskiorku og mannagongd, tá ið veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør.

Sambært áliti viðvíkjandi klagu um sýtan av loyvi at fiska makrel frá Løgtingsins Umboðsmanni frá 10. desembur 2014 verður sagt á síðu 32, at "*(h)eimildin hjá landsstýrismanninum sambært § 8, stk. 7 fevnir eftir mínum tykki einans um, at landsstýrismaðurin við kunngerð kann áseta reglur um, hvussu fiskiorka verður roknað út, og um mannagongd fyri samanlegging og umsiting av § 8, stk. 1 – 5. <u>Eg meti tí, at tað er sera ivasamt, um landsstýrismaðurin hevur heimild til at undantaka línuskipini frá metingini av fiskiorku sambært § 9 í kunngerðini um áseting av fiskiorku og mannagongdum</u>.*"

Vørn kunnugt, hevur Fiskimálaráðið tikið átalurnar frá Løgtingsins Umboðsmanni til eftirtektar, og skal Vørn tískil boða frá, at so leingi ongar reglur í kunngerð smbr. § 8, stk. 7, í lóg um vinnuligan fiskiskap áseta reglur um útrokning av veiðiorku fyri fiskifør í bólki 3, er útgangsstøðið støddarkravið smbr. § 8, stk. 1, í lóg um vinnuligan fiskiskap.

Boðast skal tískil frá, at ein umsókn um at flyta veiðiloyvi frá einum fari í bólki 3 til eitt størri far, roknað sum longd x breidd x dýpd, ikki verður gingin á møti.

Vinarliga heilsan

**Hannus Petersen**